# Sp/f Høgni Mikkelsen selt alt




*Her stendur Høgni Mikkelsen framman fyri Blómubrekku, sum Sp/f KJ Smíð nú eigur.*

**Sp/f Høgni Mikkelsen hevur selt allar ognirnar og fríggjadagin varð tað seinasta undirskrivað. Sp/f KJ Smíð hevur keypt Blómubrekku, bygningin á Hjalla, amboðini og menninar. Bjarni Poulsen, byggimeistari, hevur keypt trøðna oman fyri Berjabrekku og Sp/f J&K Petersen trøðna á Boðanesi.**

SØLA

*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

**Tórshavn**: – Eg havi arbeitt innan byggivinnuna í 25 ár, og nú havi eg brúk fyri at taka mær av løttum í eina tíð. Eg havi leingi ætlað at selt allar ognirnar hjá felagnum, so tað er frálíkt, at allar avtalurnar nú eru komnar upp á pláss, sigur Høgni Mikkelsen.

Sp/f KJ Smíð við Kristini Johansen á odda hevur keypt alt arbeiðið, sum er í gerð í Blómubrekku – t.e. 39 íbúðir. Somuleiðis hevur felagið keypt stóra bygningin á Hjalla, amboðini og menninir, sum starvast hjá Sp/f Høgna Mikkelsen, eru bodnir at halda fram at arbeiða í Blómubrekku, men nú hjá Sp/f KJ Smíð.

– Eg spurdi Høgna í skemti, um eg kundi keypa ognirnar hjá felagnum, men hann segði ja næstan við tað sama. Ætlanin var í fyrstu syftu at keypa allar ognirnar hjá Sp/f Høgna Mikkelsen – eisini byggistigið á Løgmannabreyt, men peningastovnarnir vildu ikki at fíggja tað, sigur Kristin Johansen.

Áðrenn Sp/f KJ Smíð keypti Blómubrekku, vóru allar íbúðirnar seldar, og eigararnir verða teir somu, nú Sp/f KJ Smíð er ánari. Kristin Johansen sigur, at hann ætlar at gera allar íbúðirnar lidnar sum skjótast:

– Vónandi áðrenn árið 2006 er farið afturum. Bygningin á Hjalla ætli eg at royna at leiga út, sigur Kristin Johansen og leggur afturat, at arbeiðsmenninir hjá Høgna vórðu kløkkir, tá teir í gjár fingu at vita, at ognin var seld.

Í alt arbeiða átta mans hjá Sp/f Høgna Mikkelsen, og í hesi løtu hava seks av teimum samtykt at halda fram at arbeiða hjá Sp/f KJ Smíð.

Kristin Johansen hevur somuleiðis stórar byggiætlanir undir Gráasteini, har ætlanin er at byggja 96 nýggjar íbúðir. Men felagið sleppur ikki framat enn, so í fyrstu atløgu fær Blómubrekka fyrsta prioritet, váttar Kristin.

### 32 marglætisíbúðir

J&K Petersen hevur keypt stóru trøðna á Boðanesi í Havn frá Sp/f Høgna Mikkelsen. John Petersen stjóri, váttar, at felagið ætlar at byggja 32 íbúðir á økinum:

– Vit hava leingi ætlað at keypt eina trøð. Tá Høgni Mikkelsen so beyð okkum at keypa hesa, smekkaðu vit bara til. Allar 32 íbúðirnar fara at verða úr góðari góðsku – marglætisíbúðir. Men somuleiðis fara vit at selja nøkur grundstykkir, sigur John Petersen.

### Berjabrekka víðkað

Bjarni Poulsen, byggimeistari, er triði keyparin. Hann hevur keypt trøðna oman fyri Berjabrekku:

- Ætlanin er at víðka um Berjabrekku, so nýggju íbúðirnar fara at minna um tær, ið longu eru. Eg ætli mær at fara í gongd sum skjótast. Eg havi longu fingið nakrar fyrispurningar frá fólki, ið ynskja at keypa, sigur Bjarni Poulsen.

Ítróttarsosialurin
– vit eru har tað hendir



## Nýggja nevndin lagt til brots

**Mykines:** Við nýggja formanninum á odda, hevur ungmannafelagið í Mykinesi, nevnt Súlan, sett sær stór mál fyri framman.

Formaðurin, Katrin Johannesen og hini í nevndini løgdu á aðalfundi týsdagin í farnu viku fram eina ætlan um at seta gomlu dansistovuna í upprunaligan stand.

Í nevndini eru annars Jógvan Meinhard Johannesen, næstformaður og Esbern í Eyðansstovu, kassameistari. Eykalimir eru Oskar Joensen og Randi Zachariassen.

Felagið varð stovnað í 1945. Í tí eru 43 limir.

**sb.**

## Læra at handfara hundar

**Argir:** Kennir tú hundar, ið ikki ganga pent í bandi? Hundar, sum goyggja ómetaliga illa? Veitst tú um hundar, sum hoppa upp, tá ið tú kemur inn at vitja, og sum halda seg vera fólk?

Tey, sum í øllum førum hava áhuga í hesum evni er Hundaeigarafelag Føroya. Felagið er nú so smátt farið í gongd við virksemið sítt.

Í hesum sambandi koma høvuðsinstruktørarnir, Anette og Erling Olsen frá Dansk Kennel Klub higar at skipa fyri skeiði í venjing av hundi. Hetta skeiðið er ætlað fólki, ið ynskja at læra at handfara og venja hundar.

Sagt verður, at um onkur hevur hug at gerast hundavenjari og limur í føroyska hundafelagnum HUFF/DKK, so er hetta skeiðið júst fyri tey.

Skeiðið verður hildið á Argja skúla nú um páskahátíðina, tvs. í døgunum 13. til 16. apríl.

**sb.**

## Serstøk páskavitjan úr Klaksvík

**Kalsoy:** Á páskum vitja nógv fólk út á bygdirnar kring landið. Kalsoyggin er helst einki undantak í so máta.

Nú hava Pól Johannesen, trúboðari hjá Heimamissiónini og Øssur Kjølbro, missiónsleiðari hjá Kirkjuliga Missiónsfelagnum lagt ætlanir saman um at fara út í Kalsoynna um skírishalguna at hava møtir á Húsum og Mikladali.

Møtini byrja skírisaftan, tá ungdómsmøti verður í bygdarhúsinum á Húsum. Skírisdag verður møti í Mikladals kirkju og langafríggjadag er familjumøti á sama staði.

Tey, sum eru stødd á Kalsoynni um páskirnar fáa her møguleika at hoyra bæði talur, sangir, bíbliusøgur og vitnisburðar.

**sb.**

## Føroya Bjór best í kongaríkinum

Enn einaferð yvirhálar øl frá Føroya Bjór onnur ølsløg úr øllum kongaríkinum. Á árligu ølsmakkingini hjá felagnum “Selsskab for Vestjydsk ølkultur” nú um dagarnar legði páskabryggin hjá Føroya Bjór seg so klárt á odda framman fyri hópin av páskabryggi hjá 10 øðrum bryggjaríium um alt Danmark. Talan er um klassa 2 øl ella tað vit kalla “Gullstyrki”.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at ølið frá tí norðasta bryggjarríinum í kongaríkinum liggur millum best smakkandi ølsløgini. Í fjør lá páskabryggin hjá Føroya Bjór á einum 2. plássi. Vanliga er ølsmakking tvær ferðir um árið, í sambandi við jólini og páskini. Hjá Føroya Bjór eru tey sera errin av, at hava vunnið enn eina ølsmakking. Hetta eru eisini góð tíðindi fyri norðingar, hóast Undirsjóvartunnilin skjótt verður latin upp og tað mesta snýr seg um hann.